# NSÍ var aftur hesa ferð mest sannførandi

**Við nýggjum monnum við stýrisvølin gekk tað væl hjá HB, sum vann torføran útidyst, meðan KÍ ikki var serliga sannførandi, tá vónin hjá toftamonnum at vera við í meistarastríðnum kámaðist heilt nógv**

SAMANUM 13. UMFAR
*Jóannes Hansen*



*Runavíkingar vóru sannførandi, tá teir um vikuskiftið hildu fast um oddasessin við 4-0 sigrinum á EB/Streymi*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Nú sjøtul varð settur á síðsta triðingin av hesum kappingarárinum, er spenningurin framvegis rættuliga stórur, og turbolensurin hevur síðstu vikurnar verið ógvusligari, enn hann áður hevur verið í føroyskum fótbólti.

Í trettanda umfarinum fullu stigini umleiðs soleiðis, sum tað kundi roknast við. B36 og KÍ vunnu øll stigini á heimavølli, hóast avrikini og sigrarnir ikki vóru so sannførandi, og NSÍ vann sannførandi heimasigur ímóti EB/-Streymi. Fyri triðju ferð í ár noyddust vágbingar at lata sær linda málleysan javnleik á heimavølli, og so eydnaðist tað HB at fara úr Gøtu við øllum. Í hvussu so er nú fyrrverandi venjarin, Ion Geolgau, hevði sambært tí, sum hann í síðstu viku segði í blaðnum, roknað við sigrinum. Hetta var fyrstu ferð í fýra týdningarmiklum dystum, at HB yvirhøvur fekk úrtøku.

Úrslitini hesa ferð hava við sær, at NSÍ framvegis er oddalið, og at KÍ, sum leygardagin fylti 98 og HB, sum 17. oktober røkkur 98, bara eru eitt stig aftanfyri oddaliðið. B68 tapið í Klaksvík ger, at toftamenn nú eru sjey stig frá oddasessinum og seks stig frá heiðursmerkjaplássunum, og tískil eru vánirnar hjá teimum at endurvinna bronsumerkini, sum teir hava átt tvey tey seinastu árini, nógv minkaðar. Støðan hjá GÍ er sjálvandi nógv øðrvísi, enn hon hevði verið, um teir høvdu fingið fult ímóti HB.

Meistaraliðið frá í fjør gjørdi sítt, um enn sigurin á TB var trilvandi. B36 hevur framvegis møguleikar at blanda seg í heiðursmerkja stríðið, men teir hava bara ein so kallaðan seks stigs dyst eftir ímóti einum av teimum trimum fremstu liðunum. Hann verður 15. september í Gundadali ímóti KÍ.

## Lykladystirnir

Tey trý oddaliðini eiga tveir innanhýsis dystir á. NSÍ er annar parturin í báðum tveimum. 15. september skulu teir spæla á heimavølli ímóti HB, og í síðsta umfarinum skulu teir spæla í Klaksvík.

Umframt í innanhýsis uppgerðunum sær skráin hjá oddaliðunum soleiðis út:

NSÍ skal spæla á heimavølli ímóti HB og B68, og so skulu teir spæla á Skála, á Tvøroyri og í Klaksvík.

HB skal spæla á heimavølli ímóti VB, Skála og EB/Streymi, og so skulu teir til Runavíkar og í síðsta umfarinum til Tvøroyrar.

KÍ skal spæla á heimavølli ímóti GÍ og NSÍ, og á útivølli verða mótstøðuliðini EB/Streymur, B36 og VB.

Í vikuskiftinum hevur verið tosað nógv um málmunin sum avgerandi fyri støðuna, tá tað er javnt í stigum. Reglurnar eru soleiðis, at um tað stendur á jøvnum í stigum, so eru tað fyrst innanhýsis stigini, ið gera støðuna av (málini verða ikki roknað í hesum sambandinum). KÍ og HB hava vunnið hvør sína av innanhýsis uppgerðunum. Tí er tað málmunurin, sum ger av, at HB er næstfremst og KÍ triði fremst.

KÍ vann 1–0 í Runavík, og HB vann 4–0, tá NSÍ var í Gundadali.

Ofta verður mett um, hvat av oddaliðunum eigur léttastu uppgávurnar á. Um tað verður roknað út frá støðutalvuni, so er skjótt at staðfesta, at HB eigur léttastu mótstøðuliðini, men talan verður um rættuligan tronga, tá teir fara til Runavíkar. Um HB ikki fær stig burturúr tí uppgerðini, so fer at síggja svart út.

Á pappírinum tykjast NSÍ og KÍ at eiga fleiri torførar uppgávur á, áðrenn liðini bresta saman í Klaksvík í síðsta umfarinum. Uttan mun til hvussu úrslitið verður í tí dystinum, so bendir nógv á, at gullkrónurnar fara at verða handaðar í Klaksvík, um tær ikki skulu til Tvøroyrar – kanska við tyrluni, sum tað meiri enn eina ferð áður er komið fyri.

## Turbolensurin

Tá tað í innganginum varð nevnt, at turbolensurin hesar seinastu vikurnar hevur verið størri, enn hann plagar at vera, so varð serliga hugsað um støðuna hjá venjarunum. Har hevur veruleikin seinasta mánaðin myndast soleiðis, sum tað annars er at frætta frá útlandinum.

Í helmingunum av feløgunum hevur ikki verið so nógv at frætt, men tað hevur tað verið í hinum feløgunum. Í NSÍ, KÍ, GÍ, Skála og EB/Streymi hevur tað higartil verið heilt friðarligt.

TB og VB skiftu venjara undan summarsteðginum. Síðandi fréttist tað, at B36 venjarin hevði fingið stuðul afturat sær, og so misti HB venjarin høvdið. Ion Geolgau mundi hava kent ógvusligt trýst á sær, síðani hann síðsta heyst varð settur í aftur starvið, sum hann hevði verið úr í tveir dagar. Kravið hjá HB er sigur í hvussu so er í aðrari kappingini á hvørjum ári. Í fjør heilkiksaði tað, og eftir ósigurin í steypafinaluni var kreditturin hjá HB venjaranum uppi, tá teir í landskappingini høvdu tapt ímóti KÍ og B36.

Eftir at HB hevði fingið nýggjan venjara, boðaði B68 venjarin í síðstu viku frá, at hann og B68 ikki hóska saman, og at teirra vegir fara at skiljast í heyst. Spurningurin er so, um turbolensurin á venjarafrontinum er steðgaður, ella um tað fara at vera fleiri tíðindi, nú endin á kappingarárinum av álvara nærkast.

## Hvassari botnstríð

Skála eigur framvegis fyrsta sigurin í bestu deildini til góðar. Hesa ferð fegnaðust skálamenn um javnleikin í Vági, og tað er væl skiljandi. Lykladysturin um at sleppa undan beinleiðis niðurflytingini, tykist framvegis at skula verða tann í næstsíðsta umfarinum, tá TB skal spæla á Skála. Javnleikurin hjá Skála í Vági ber við sær, at tað nú er møguleiki fyri, at Skála heilt víst kann sleppa undan beinleiðis niðurflytingini, um tað eydnast teimum at vinna heimadystin ímóti TB.

Hetta er kortini treytað av, at hvørki av botnliðunum fær stig í øðrum dystum. Avrikini hjá bæði TB og Skála sunnudagin vístu, at tað meiri enn so kann koma fyri, at tey fáa stig.

At tað verður FS Vágar, sum flytir upp aftur í 1. deild, er eingin ivi um. Meiri ivasamt man tað vera, um nakað annað lið fer at megna uppflyting. Stríðið um næstfremsta plássið í 2. deild er tættari enn nakrantíð. Samstundis sum liðini stríðast fyri uppflytingar møguleikanum, mugu tey ansa eftir ikki at enda niðanfyri niðurflytingar strikuna!

ÍF-Sumba 5-1 (1-1):

# ÍF fekk aftur ferð á

**Eftir fimm dystir uttan sigur, fingu fuglfirðingar ferð á, tá Sumba vitjaði leygardagin**

2. DEILD
*Jákup Mørk*

Fuglfirðingar hava havt tað væl truplari í ár, enn teir upprunaliga ætlaðu. Vónin var sjálvandi at hava eitt orð at siga í oddinum, men ístaðin hevur tilveran verið miðskeiðis á stigatalvuni, og í seinastuni er niðurflytingarvandin av álvara farin at spøkja.

Fyri at lætta um byrðuna hjá Paula Jarnskor, hevði leiðslan tí til dystin leygardagin fingið hjálp frá Peturi Mohr, sum í ár heldur frí frá fótbóltinum, og hetta skuldi vísa seg sum ein skilagóð avgerð.

Við Paula Jarnskor sum leikandi venjara á miðvøllinum tóku fuglfirðingar ímóti Sumba, sum eisini tykist vera uppsteðgað, og annað vikuskiftið á rað máttu sumbingar taka til takkar við stórtapi.

Tað var annars Johnny Skibbenæs, sum legði sumbingar á odda, men eftir hetta gekk tað fyri tað mesta ein veg. Undan steðginum javnaði Hanus Eliasen fyri ÍF, og tá Sumba í seinna hálvleiki misti fyrst ein og síðani tveir mans, tá dómarin hevði reyða kortið á lofti, so lág alt opið fyri fuglfirðingunum.

Teir lótu sær heldur ikki hetta siga tvær ferðir, og við málum frá Heina Heinason, einum afturat frá Hanusi Eliasen og so tveimum frá Høgna á Lakjuni gjørdu teir bart, soleiðis at ÍF nú aftur hevur vón um at vinna sessin aftan fyri FS Vágar. Men hinvegin tykist tað í løtuni soleiðis, at tað hava átta av hinum feløgunum í deildini eisini vón um...

**ÍF-Sumba 5-1 (1-1)**
0-1: Johnny Skibbenæs
1-1: Hanus Eliassen
2-1: Heini Heinasson
3-1: Hanus Eliassen
4-1: Høgni á Lakjuni
5-1: Høgni á Lakjuni

# Petur Mohr er á veg til Toftir

**Hóast sáttmáli ikki er undirskrivaður, so bendir nógv á, at B68 komandi ár fer at hava sama venjara, sum teir høvdu í 1994 og í 1995**

VENJARI
*Jóannes Hansen*

Nógv bendir á, at tað verður ein gamal kenningur á Svangaskarði, sum komandi ár fer at hava ábyrgdina av B68 liðnum. Eingin sáttmáli er undirskrivaður, men Niclas Davidsen, formaður í B68, váttar, at teir tosa við Petur Mohr um samstarv komandi kappingarár.

Eftir at tað fyrr í summar var greitt, at Frank Skytte ikki fór at halda fram á Toftum, hevur B68 hugt eftir nýggjum venjara, og nú tykist tað altso, sum at ein loysn er í ljósmálanum.

Petur hevur hildið frí frá venjarastarvinum í ár, men í síðstu viku fór hann til Fuglafirðar at rætta eina hjálpandi hond.

B68 og Petur Mohr hava samstarvað áður. Hann var venjari á Toftum í 1994 og í 1995, tá B68 fyri einastu ferð higartil rakk steypafinaluni – teir taptu 3–1 ímóti HB – og tá B68 endaði á triðja plássinum, sum teir eisini endaðu á í fjør og í fyrraárið, og sum teir nú tykjast fara hava ilt við at endurvinna.

Petur Mohr er ein av royndastu venjarunum í landinum. Hann hevði roynt seg sum venjara í NSÍ, tá hann í 1991 kom til Klaksvíkar og gjørdi KÍ til meistarar fyri fyrstu ferð í nítjan ár. Í 1992 og í 1993 var hann eisini venjari hjá KÍ, og eftir tey bæði árini á Toftum vandi Petur NSÍ í trý ár, og hann var eisini venjari hjá NSÍ í fjør.

Tá vit spyrja B68 formannin, hvussu tað verður við spælarum komandi ár, svarar Niclas Davidsen, at tað er alt ov tíðliga at siga nakað um tað enn.




14/9-2002 – 10/5 2003

# Vetrarferðaætlan fyri M/F Norrönu

## Ferðaætlan fyri M/F Norröna 14.09.2002 – 30.12.2002

| Siglingarleið | Dagur | Koma | Fráferð | September | Oktober | November | Desember |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Hanstholm | Leygardag | 13.00 | 17.00 | 14 21 28 | 05 12 19 26 | 02 09 16 23 30 | 07 14 21 28 |
| Lerwick | Sunnudag | 15.00 | 16.00 | 15 22 29 | 06 13 20 27 | 03 10 17 24 | 01 08 15 22 29 |
| Tórshavn | Mánadag | 06.00 | - | 16 23 30 | 07 14 21 28 | 04 11 18 25 | 02 09 16 23 30 |
| Tórshavn | Hósdag | - | 22.00 | 19 26 | 03 10 17 24 31 | 07 14 21 28 | 05 12 19 26 |
| Lerwick | Fríggjadag | 12.00 | 13.00 | 20 27 | 04 11 18 25 | 01 08 15 22 29 | 06 13 20 27 |

## 02.01.2003 – 10.05.2003

| Siglingarleið | Dagur | Koma | Fráferð | Januar | Februar | Mars | April | Mai |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Hanstholm | Leygardag | 13.00 | 17.00 | - 04 11 18 25 | 01 08 15 22 | 01 08 15 22 29 | 05 12 19 26 | 03 |
| Lerwick | Sunnudag | 15.00 | 16.00 | - 05 12 19 26 | 02 09 16 23 | 02 09 16 23 30 | 06 13 20 27 | 04 |
| Tórshavn | Mánadag | 06.00 | - | - 06 13 20 27 | 03 10 17 24 | 03 10 17 24 31 | 07 14 21 28 | 05 |
| Tórshavn | Hósdag | - | 22.00 | 02 09 16 23 30 | 06 13 20 27 | 06 13 20 27 | 03 10 17 24 | 01 08 |
| Lerwick | Fríggjad. | 12.00 | 13.00 | 03 10 17 24 31 | 07 14 21 28 | 07 14 21 28 | 04 11 18 25 | 02 09* |

* Koma Hanstholm leygardag 10.05. kl. 13.00

## Einvegis ferðaseðlakostnaður fyri hvønn

| | 4-koyggjuk. við WC/bað | 2-koyggjuk. við WC/bað | Luksus-kamar | Bilar undir 5 m. | Eyka metur | Motor-súkklur | Súkklur |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Føroyar – Danmark ella hinvegin | 1.200,- | 1.520,- | 2.240,- | 720,- | 160,- | 280,- | 80,- |
| Føroyar – Hetland ella hinvegin | 720,- | 900,- | 1.180,- | 440,- | 80,- | 180,- | 20,- |
| Danmark – Hetland ella hinvegin | 720,- | 900,- | 1.180,- | 440,- | 80,- | 180,- | 20,- |

## Bilpakkar Tórshavn-Hanstholm ella hinvegin

| | 4-koyggjuk. við WC/bað | 2-koyggjuk. við WC/bað | Luksus-kamar |
|---|---|---|---|
| Bilur + 4 Pers. | 4.200,- | 5.160,- | 7.560,- |
| Bilur + 3 Pers. | 3.080,- | 3.800,- | - |
| Bilur + 2 Pers. | 2.360,- | 2.840,- | 4.040,- |

## Bilpakkar Tórshavn-Lerwick ella hinvegin

| | 4-koyggjuk. við WC/bað | 2-koyggjuk. við WC/bað | Luksus-kamar |
|---|---|---|---|
| Bilur + 4 Pers. | 2.540,- | 3.100,- | 3.980,- |
| Bilur + 3 Pers. | 1.880,- | 2.300,- | - |
| Bilur + 2 Pers. | 1.420,- | 1.700,- | 2.140,- |

2 fyri 1 ferðist tvey – gjaldið fyri ein!
galdandi til og við 9. mai 2002

Ferð fyri tvey vaksin við bili Tórshavn – Hanstholm og aftur í 2 koyggjukamari við WC/bað
2.990,-

2 fyri 1 ferðist tvey – gjaldið fyri ein!
galdandi til og við 9. mai 2002

Ferð fyri tvey vaksin við bili Tórshavn – Lerwick og aftur í 2 koyggjukamari við WC/bað
2.200,-

## Shetlands Cruise hósdag – mánadag

| | 4-koyggjuk. við WC/bað | 2-koyggjuk. við WC/bað |
|---|---|---|
| Grand-/Quenns Hotel | 1.550,- | 1.730,- |
| Shetland-/Lerwick Hotel | 1.690,- | 1.870,- |
| Herrislea House Hotel | 1.550,- | 1.730,- |
| Privat Gisting | 1.280,- | 1.460,- |
| Vallaraheim | 1.010,- | 1.190,- |

## Pakkaferð við innivist í 9 dagar

| | 4-koyggjuk. við WC/bað | 2-koyggjuk. við WC/bað |
|---|---|---|
| Grand-/Quenns Hotel | 4.100,- | 4.280,- |
| Shetland-/Lerwick Hotel | 4.940,- | 5.120,- |
| Herrislea House Hotel | 4.100,- | 4.280,- |
| Privat Gisting | 3.220,- | 3.400,- |
| Vallaraheim | 2.030,- | 2.210,- |

**Íroknað prísin er:**
Ferðin aftur og fram við Norrönu í einum av nevndu kamarssløgum. Fyri Shetlands-cruise 2 nætur og vikuferð 9 nætur v. morgunmati á einum av nevndu gistingarstøðum. Á vallaraheiminum er ikki íroknaður morgunmatur.
Á hotellunum og fyri privata gisting er innivist í dupultkamari, meðan á vallaraheiminum í felagsrúmi. Fyri børn, einakamar, eykasong eru aðrir prísir galdandi. Nærri fæst at vita á skrivstovu okkara.

## 1 vika í summarhúsi í Easterhoull Chalets
2 vaksin og 2 børn v. bili

| | 4-koyggjuk. við WC/bað |
|---|---|
| Hús við 2 rúmum | 4.940,- |
| Hús við 3 rúmum | 5.630,- |



## Danland –
**2 vaksin og 2 børn við bili**
galdandi frá 14.09.2002 til 10.05.2003

| Blokhus • Ebeltoft (myndin) • Hirtshals | |
|---|---|
| Gisting 7 nætur | 4.995,- |

**Íroknað prísin er:**
Ferðin aftur og fram við Norrönu í 4-koyggjukamari við WC/bað.
Uppihald omanfyrinevnda dagatal á nevndu frítíðardeplum.
Danland hevur eisini líknandi deplar aðrastaðni í Danmark. Hesir eru í Søndervig, Fanø, Rømø, Bork Havn, Lemvig, Skagen, Øster Hurup, Fåborg, Rudkøbing, Østersøen – Møn, Blåvand og Bornholm



## Pakkaferð við gisting á hotelli
**Fyri hvønn við 2 ferðandi í bilinum**
galdandi frá 14.09.2002 til 10.05.2003

| Gisting | Hotel Hanstholm Hanstholm | Park Hotel Aalborg |
|---|---|---|
| 7 nætur | 3.290,- | 3.350,- |
| | Hotel Excelsior Keypmannahavn | |
| | 3.795,- | |

**Íroknað prísin er:**
Ferðin aftur og fram við Norrönu í 4-koyggjukamari við WC/bað.
Uppihald nevnda dagatal á omanfyrinevndu hotellum í dupultkamari við WC/bað.
Á hotellunum er morgunmatur íroknaður.

SMYRIL LINE
e-mail: booking@smyril-line.fo · www.smyril-line.fo
Tel 34 59 00